# Chop Chop: En tapper jordbos berättelse

Høvundur og myndprýðari: Linda Bondestam (Finnland)
Forlag og útgávuár: Förlaget, 2024

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2025

Søgugongd: Í bókini fylgja vit glaða tólmenninum, Chop Chop, tvey tíðarskeið, í ár 2032 og 2142. Chop Chop hevur altíð lagt seg eftir at hjálpa menniskjum og at gera sítt arbeiði til lítar, hóast arbeiðið ikki altíð verður virðismett. Hvussu mann standa til við verðini í framtíðini, og hvussu munnu menniskjuni og tólmennini trívast saman?'

Evni: kríggj, kenslur, tilvera, lív, menning, umhvørvisbroytingar




## Samrøða og uppgávur:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið eftir gulu opnuni á s. 1-2 saman. Heilsa uppá barnið á sama hátt, sum Chop Chop, og sig "Halló Halló". Gerið rørslur og ljóð, sum eitt tólmenni. Hyggið eftir myndunum og endursigið søguna saman uttan at lesa tekstin.**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at fyrstu gulu opnuni á s. 1-2. Hvør er tað, sum sigur "Hey" við okkum? Hvat halda tit, bókin snýr seg um?**

**2. Tosið saman um, hvørjar styrkir og eginleikar Chop Chop hevur í bókini. Hvørjar styrkir og eginleikar høvdu tit havt, um tit vóru eitt tólmenni?**

**3. Finnið pappír, papp og gamalt kartong, byggið tykkara egna tólmenni og gevið tí eitt navn. Tosið um, hvørjum tykkara tólmenni arbeiðir við, hvar tað býr, og hvat tað dámar at gera.**

### MIÐLINGAR

**1. Hyggið at opnuni á s. 23-24 við øllum menniskjunum á gøtuni. Hvat hendir á myndini, og hvørjar kenslur eru í spæl? Kenna tit onkrar av kenslunum aftur? Hvørjar kenslur eru góðar? Hvørjar kenslur eru ikki so góðar?**

**2. Chop Chop hevur nógvar arbeiðsuppgávur. Hvørja arbeiðsuppgávu høvdu tit viljað roynt? Hava tit nakað dreymastarv? Tá øll hava funnið eitt starv, kunnu tit fortelja hvørjum øðrum um tykkara dreymastarv.**

**3. Í bókini fær Chop Chop nógvar av arbeiðsuppgávunum hjá øðrum menniskjum. Hugsið um, hvussu tað mann kennast, tá onkur annar fær títt arbeiði, ella ein verður valdur frá til eitt arbeiði. Hvussu mann tað kennast fyri tey, sum arbeiða á virkinum, íroknað stjóran, at missa sítt starv? Hvat skulu tey nú gera?**

**4. Tekna eina brúkaravegleiðing til eitt tólmenni og skriva niður funkur, førleikar og styrkir hjá tólmenninum. Fá íblástur frá uppslagnum áðrenn søgan byrjar, har tað stendur: Í byrjanini var alt eitt printarakort.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Les bókina og hugsa um, hvussu hon fær teg at kenna teg. Skrivar niður allar kenslurnar, sum bókin vekir í tær. Hvat er tað, sum fær teg at kenna tað soleiðis?**

**2. Tá Chop Chop vaknar einsamallur á s. 63, saknar hann menniskjuni. Hvussu kennist einsemi? Kennir tú onkran, sum er einsamallur? Hvat kunnu vit gera fyri at hjálpa fólki við at kenna seg minni einsamøll?**

3. Hygg at uppslagnum við verkfallinum á s. 37-38. Hví eru øll so ill? Hvussu hevur Chop Chop tað? Er nakað, sum tú kundi hugsað tær at broytt í skúlanum, og sum tú kundi hugsast at farið í verkfall fyri? Ger eina plakat um eitthvørt, tú vilt fara í verkfall fyri.

4. Frá s. 41 er nógv kríggj, og har er nakað, sum verður rópt "bumban yvir bumbur". Hvat er tað? Hví brestur kríggj á, halda tit?

5. Kannið, hvussu ST t.d. arbeiðir fyri friði, ella hvussu Reyði krossur arbeiðir við neyðhjálp. Hvat kanst tú gera?

---

**AÐRAR SPENNANDI BØKUR:**

Oravien sota eftir Riina Katajavuori og Martin Baltscheit

Det som finnes og det som er borte eftir Kaia Dahle Nyhus

Mítt botnlív: skrivað hevur ein einsamallur axolotlur eftir Lindu Bondestam

---

MÁLBITIN

## "Tólmenni"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Robot | Robot | Robot | Vélmenni | Tólmenni | Robotti | Robotti | Robohtta |



**Fá íblástur til myndabøkur við at fylgja Norðurlendska bókalúkinum á Instagram: @nordiskabokslukaren**